# BILAR

SAMBAND
Magnus Gunnarsson
maggi@sosialurin.fo
tlf. 341800

**Bilradio á Ras2**
*Bilradio er í summarfrí. Næsta sending verður send týsdagin 19. august.*





*Tað ger einki um bilurin einki bakkgir hevur. Hann er lættur at bera upp á pláss*



*Peel 50 er ein sera einfaldur bilur. Hann hevur bert eina hurð, sum er vinstrumegin*

# Heimsins minsti bilur

**Heimsins minsti seriuframleiddi bilur, mikrobilurin Peel P50, varð herfyri royndarkoyrdur í sjónvarpssendingini Top Gear á BBC´2. Verturin á sendingini, Jeremy Clarkson, mátti næstan brúka skóhorn fyri at sleppa inn í bilin**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Verturin á væl umtóktu bilsendingunum "Top Gear" á BBC´2, Jeremy Clarkson, finnur upp á mangt og hvat í sínum sendingum. Herfyri royndarkoyrdi hann heimsins minsta bil, mikrobilin Peel P50. Clarkson, sum er 1,96 m høgur, mátti næstan brúka skóhorn fyri at sleppa inn í bilin.

Clarkson koyrdi bilin gjøgnum gøturnar í miðbýnum í London, og tók hann við sær inn í bygningin hjá BBC. Hann fór í elevatorin við bilinum og vitjaði á teimum ymisku hæddunum, eisini har sum tíðindafólkini júst tá lósu tíðindi. Hann koyrdi t.d. við bilinum á redaktiónsfund.

Peel P50 er heimsins minsti bilur. Tað var verksmiðjan Peel Engineering Company á Isle of Man sum framleiddi bilin frá 1962 til 1965. Peel P50 er 134 cm langur, 99 cm breiður og vigar einans 59 kg. Motorurin er 49 cc við 4.5 hk. Hann hevur 3 gir og einki bakkgir.

Talan er um ein 3-hjólaðan bil við tveimum hjólum framman og einum aftan.

Peel P50 er minsti bilur sum nakrantíð hevur verið seriuframleiddur.





*Verturin á bilsendingunum "Top Gear" á BBC´2, Jeremy Clarkson, við heimsins minsta bil seriuframleidda bili, mikrobilinum Peel P50*



*Jeremy Clarkson, sum er 1,96 m høgur, mátti næstan brúka skóhorn fyri at sleppa inn í bilin*



*Fólk hugdu undrandi, tá Jeremy Clarkson hevði mikrobilin Peel 50 við sær til arbeiðis í BBC bygninginum í London*